**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Stuðulsskipanin fyri vaksin*

## ENDURLÝSING

# Sosialráðgevi/ ráðgevi

### til stuðulsskipanina fyri vaksin

Eitt starv sum Sosialráðgevi/ráðgevi á Stuðulsskipanini fyri vaksin, undir Heimarøktini og Serforsorgini, verður hervið lýst leyst.

Stuðulsskipanin fevnir um stuðul til umleið 114 heimabúgvandi brúkarar, svarandi til umleið 42 fulltíðarstørv.

**Talan er um avloysarastarv í tíðarskeiðnum: 1. juni – 31. desember 2006.**

**Starvsuppgávur:**
- At ráðgeva og vegleiða
- Samskipa stuðulin, tá fleiri starvsfólk eru inni í myndini
- Viðgera nýggjar umsóknir
- Ráðgeva feløgum og stovnum
- Endurmeta ta hjálp, sum er veitt einum brúkara

**Vit søkja eftir einum starvsfólki, ið:**
- Hevur vitan og royndir innan sosiala øki
- Hevur áhuga at arbeiða við brekaðum
- Dugir at skapa positivt og virðiligt samband við brúkaran
- Dugir at arbeiða skipað og miðvíst
- Dámar at arbeiða bæði sjálvstøðugt og tvørfakliga
- Er sálarliga væl fyri og dámar avbjóðingar
- Er uppfinningarsamt og dugir at umstilla seg skjótt

**Vit bjóða:**
- Eitt mennandi arbeiði, har nógv er at gera
- Eitt arbeiðsumhvørvi, har pláss er fyri látri
- Vegleiðing
- Supervisión

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Heimarøktina og Serforsorgina. Tænastustaðurin í løtuni er Stuðulsskipanin fyri vaksin.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Stuðulsskipanina á tlf. 354020 og tosa við Odu Jóhansdóttir, virkandi leiðara ella við Sofíu Jespersen virkandi varaleiðara.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Stuðulsskipanin fyri vaksin**
Stílað: Oda Jóhansdóttir
Løkjatún 1
160 Argir

**Umsóknarfreistin er: 24. apríl 2006.**

**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**
*SERSTOVNADEILDIN*

# Fulltrúi til Serstovnadeildina

Heimarøktin og Serforsorgin søkir við hesum eftir fulltrúa til Serstovnadeildina at byrja 01. juni 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Um Serstovnadeildina**
Serstovnadeildin er ein av fimm deildum undir Heimarøktini og Serforsorgini. Serstovnadeildin umsitir bústaðar-, arbeiðs- og virknistilboð til vaksin fólk við menningartarni.

Heimarøktin og Serforsorgin hevur sett sær sum mál, at endurskoða alt virksemið hjá Serstovnadeildini. Serstovnadeildin stendur tí framanfyri spennandi avbjóðingum fakliga eins og bygnaðarliga.

**Uppgávur**
Tú verður ein sentralur leikari í framtíðar menningini av Serstovnadeildini. Tú verður næsti medarbeiðari hjá deildarleiðaranum, og tú kemur soleiðis at vera tætt knýtt/ur at teimum avgerðum, sum verða tiknar um framtíðina.

Tú verður tað fakliga snúðningspunktið hjá Serstovnadeildini, og tú kemur í tí sambandi at hava dagligt samskifti við stovnsleiðararnar um fakligar spurningar.

Ein av tínum høvuðsuppgávum verður at savna og skipa vitan og upplýsingar frá teimum ymsu stovnunum, soleiðis at hesi verða atkomilig hjá allari skipanini.

Harumframt eru uppgávurnar m.a.:
- at veita fakliga ráðgeving til deildarleiðaran og stovnsleiðararnar
- at hava fakligt eftirlit við tilboðum/stovnum
- at fyrireika og fyriskipa fundir, herundir upptøkufundir
- at orða vegleiðingar, reglugerðir og mannagongdir viðvíkjandi virkseminum hjá Serstovnadeildini

Afturat hesum koma vanligar fulltrúauppgávur so sum fyrireiking av málum og málsviðgerð.

**Førleikakrøv**
- tú hevur útbúgving og royndir sum pedagogur ella líknandi
- tú hevur viðkomandi framhalds- og/ella eftirútbúgving eitt nú diplom-, master- ella kandidatútbúgving innanfyri pedagogik, sálarfrøði ella líknandi
- tú hevur hollan kunnleika til serstovnaøkið
- tú dugir væl at samskifta, herundir at orða teg bæði í skrift og talu
- tú hevur teldukunnleika á brúkarastøði, og evnar at leggja afturat hesum kunnleika

Starvsroyndir innan almenna fyrisiting er ein fyrimunur, men ikki ein treyt.

**Setan**
Starvið er fulltíðarstarv, lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jóanes N. Dalsgaard, deildarleiðara á tlf. 304020.

Umsóknir
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

**Heimarøktin og Serforsorgin**
Serstovnadeildin
Eirargarður 2, 2. hædd
FO 100 Tórshavn

**Umsóknarfreistin er fríggjadagin 11. mai 2006.**

# Útbjóðing

Vegna Fuglafjarðar kirkju verður uttandura málaraarbeiðið av Fuglafjarðar kirkju boðið út í almennari útbjóðing.

Lisitatiónin verður í Fuglafjarðar kirkju mánadagin 1. mai 2006 kl. 14.00 og kunnu teir, ið boðið hava verða hjástaddir.

Útbjóðingartilfar kann bíleggjast hjá Edmund Abrahamsen, Norður í Bø 8, FO-530 Fuglafjørður, tlf. 211906 ella 444149.

**Fuglafjørður 10. apríl 2006**
**Fuglafjarðar Kirkjuráð**

TOYOTA
reservedele
Vi kan tilbyde Danmarks største udvalg i nye og brugte reservedele til Toyota.
**Vi sender fra dag til dag til Færøerne.**
DKAUTO.DK
AUTOGENBRUG - SPECIALE TOYOTA
Flensborgvej 340 - 6200 Aabenraa
tlf. +45 7461 4110 - fax +45 7461 4164
email: salg@dkauto.dk - www.dkauto.dk
Forhenværende
Aabenraa Autogenbrug
ISO 9001 certificeret
DAG Dansk Autogenbrug - vi skåner miljø og økonomi
Autophuggernes DATALAGER DK

Lesið Sosialin - so eru tit við